gult cyan magenta svart



# Mugu verja umhvørvi og fiskivinnu

GEM-RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Týsdagin byrjaði stór oljuráðstevna á Hotel Føroyum um kanningarnar, sum GEM-samstarvið hevur staðið fyri nú í fleiri ár. Á ráðstevnuni eru sumboð fyri føroyskar myndugleikar og oljufeløgini. Úrslit frá fleiri av arbeiðsbólkunum undir GEM vórðu løgd fram. Her snýr tað seg serstakliga um umhvørvið nú undan komandi boringum á landgrunninum.

Tað var Eyðun Elttør, landsstýrismaður, sum setti ráðstevnuna. Hann vísti á, at Føroyar eru á einum avgerandi vegamóti, nú farið verður at leita eftir olju og gassi í undirgrundini.

–Í summar taka vit eitt stig, sum heilt kann broyta okkara samfelag. Vit tora at taka hetta stig, tí vit halda okkum hava tikið øll hugsandi fyrilit til at verja fiskivinnuna og umhvørvið segði landsstýrismaðurin, sum vísti á, at løgtingið í fleiri førum hevur lagt alstóran dent á týdningin at verja umhvørvið og at tryggja, at oljuleitingin á ongan hátt fer at oyðileggja møguleikarnar hjá føroyingum eisini í framtíðini at kunna lívsbjarga sær sum ein fiskivinnutjóð.

-Tað er lætt at seta sær politisk mál, men tað er ein krevjandi uppgáva at møta teimum avbjóðingum, sum umhvørvið í Norðuratlantshavið setir. Vit hava øll hvør sær eina ábyrgd at verja hetta umhvørvi. Leikluturin hjá myndugleikunum er neyðturviliga ikki tann sami sum tann hjá oljufeløgunum. Men hvørja uppgávu og ábyrgd vit enn umsita, so fáa vit ikki útint hana til fulnar, hava vit ikki neyðugu vitanina og hugburðin til at skilja umhvørvið, har virksemi skal fara í gongd.

Eyðun Elttør vísti á, at tað var við hesum tørvi fyri eyga, at GEM varð sett á stovn, nevniliga fyri at savna upplýsingar av føroyska umhvørvinum, sum so aftur skal gera tað møguligt hjá oljufeløgunum at taka tey neyðugu trygdar- og umhvørvisligu fyrilitini fyri at kunna bora í føroyskum sjógvi.

Landsstýrismaðurin takkaði øllum, sum hava havt tilknýti til GEM-arbeiðið, fyri at hava livað upp til hetta mál.



*Eyðun Elttør, landsstýrismaður setti ráðstevnuna.*
*Mynd Edvard Joensen*



*Umboð fyri føroyskar myndugleikar og oljufeløgini vóru við á ráðstevnuni týsdagin og mikudagin á Hotel Føroyum.*
*Mynd Edvard Joensen*

# Connector til fyrstu uppgávuna hjá Esvagt-Thor

VAKTARSKIP Í FRÁLANDAVINNU
*Jan Müller*

Tað verður spildunýggja útgerðarskipið "Esvagt Connector", sum fer at røkja fyrstu uppgávuna hjá nýggja felagnum "Esvagt – Thor" á føroyska landgrunninum í summar. Skipið er bygt á Lindø-skipasmiðjuni og er væl útgjørt til at røkja uppgávuna. Tað var herfyri, at sáttmáli varð gjørdur millum Esvagt – Thor og BP um at veita tænastur við vaktarskipi á føroyska landgrunninum.

Føroya felagið fer í fyrstu syftu at hava eitt vaktarskip, ið serliga skal taka sær av vaktarhaldi, meðan borað verður á føroyska leitingarøkinum. Skipið verður skrásett í Føroyum og manningin verður føroysk. Lýst verður nú eftir fólki.

P/F Thor í Hósvík, sum hevur gjørt samstarvsavtalu við felagið ESVAGT í Esbjerg, kemur við einum skipi, sum kann veita fjølbroyttar tænastur í frálandavinnuni, eitt nú bjargingar- og bráðfeinginhjálp í sambandi við komandi borivirksemið, ið byrjar í summar.

BP, sum gjørdi av at taka av einum tilboði frá ESVAGT – Thor í sambandi við leitingina við Føroyar, segði í tíðindaskrivi herfyri, at talan er um ein sera týdningarmiklan sáttmála, sum fer at geva einum føroyskum felag nýggjar vinnuligar møguleikar. Sáttmálin fer eisini at veita teimum, sum fara at arbeiða á føroyska økinum fyrstafloks bjargingartænastu og bráfeingisviðgerð. Harafturat fer sáttmálin at geva Esvagt-Thor møguleika fyri virksemi í bretska økinum, og er tað fyrstu ferð, at eitt føroyskt felag fær henda møguleikan. BP og Shell hava annars saman søkt um nýggjar teigar í 19. rundu á bretskum øki, og í tí sambandi fer at verða neyðugt við útgerðar- og vaktarskipum eisini. Annars hava feløgini sum er virksemi í bretskum øki.

Esvagt – Thor er annars farið undir at finna tey røttu fólkini til spennandi uppgávurnar á føroyska landgrunninum. Í bløðunum verður lýst eftir fólki at manna Connector, sum verður at síggja í føroyskum sjógvi um ikki so langa tíð. Talan er um fleiri spennandi størv innan frálandavinnuna, skiparar, stýrimenn, maskinmenn, kokkar og dekkarar. Umframt at skula brúka fólk til uppgávuna fyri BP skulu fólkini eisini kunna verða flutt umborð á onnur skip hjá Esvagt ella Thor. Umsóknir til umrøddu størv skulu sendast til Thor í Hósvík í seinasta lagi 14. apríl. Sambært lýsing kunnu nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen.




*Esvagt Connector, sum verður skrásett í Føroyum og skal arbeiða fyri BP á føroyska landgrunninum.*

gult cyan magenta svart



ÚT AT KOYRA

# Citroën C5 – við framkomnari Hydraktiv 3 fjaðraskipan



*Citroën er ein stórur og rúmligur bilur við 5 hurðum, og er ein dreymur at koyra við nýggjastu Hydraktiv 3 fjaðraskipanini*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Tá Citroën C5 varð alment sýndur fram í fjør varð sagt, at hann skuldi avloysa bæði tann størra XM, og Xantia. Hetta er partvís rætt, tí Xantia verður framleiddur eina tíð enn og ein nýggjur C6 kemur at avloysa XM um eini tvey ár**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Citroën C5 er tann fyrsti bilurin, sum er bygdur yvir ein nýggjan platform sum teir nevna P3. Citroën hevur útbygt tann eyðkenda undirvognin og fjaðraskipanina frá Xantia. Nú eitur skipanin Hydraktiv 3, sum millum annað ger, at fríhæddin verður minni, tá ferðin verður yvir 110 km/t á sløttum vegi. Hetta ger at bilurin verður stúttari og luftmótstøðan minni. Um bilurin kemur á óslættan veg, verður fríhæddin upp til 13 mm hægri og skipanin finnur sjálv útav nær vegurin er sléttur aftur, og bilurin kemur í vanliga hædd. Eisini er knøtturin »Sport«, til tá bilurin skal verða sportsligur at koyra við.

### Reinan motor

Fleiri motorar eru at velja ímillum. Bensinmotorarnir eru hesir, 2,0 litur 16V við 137 HK, og ein 2,0 litur HPi við beinleiðis innspræning og 143 HK, og ein 3.0i V6 við 210 HK. Turbodieselmotorarnir verða 2.0 litur við 110 hk og 2,2 litur HDi við 136 hk, báðir eru við common rail innspræning. Bilurin, vit royndarkoyrdu, 2,2 HDi við 136 hk, hevur nýggja framkomna filtrið, sum við eini eykaforbrenning reinsar sótmolarnar burtur og dálkingin verður so lítil sum til ber. Hetta er sami motorur sum Peugeot 607 HDi hevur. Seinni í ár kemur ein 1.8i bensinmotorur við 117 hk.




### Trygdarútgerðin er standard

C5 er sera væl útgjørdur. Multiplex leidningatøknifrøðin gevur møguleikar fyri nógvari eykaútgerð, sum til dømis regnsensorum, ávaringarljós sum tendra automatiskt, tá bilurin bremsar hart upp, instrumentborð við black panel, har alt ljósið kann sløkkjast uttan speedometrið. Trygdarútgerðin er standard í øllum útgávunum. Hann hevur ABS bremsur, 6 airbag, variabla servostýring, rattið kann stillast í hædd, ARS antispinn, heilautomatiskt klimaanlegg, pollenfiltur, el-síðuspegl við hita, el-síðurútar, hita í framsetrunum.

### Ein uppliving at koyra

Tað, sum altíð hevur eyðkent koyrieginleikarnar á Citroën bilunum við hydrauliskari fjaðraskipan er, at teir eru líka góðir, ella betri enn fleiri bilar í væl hægri prísklassa. Her er C5 onki undantak. Hann er ein stórur og rúmligur bilur við 5 hurðum, og er ein dreymur at koyra við nýggjastu Hydraktiv 3 fjaðraskipanini. Tað merkist næstan ikki, at bilurin er diesel, hann krafter líka væl og larmar næstan líka lítið sum ein bensinmotorur.



CITROËN

## Citroën C5 2.2 HDi

| | |
|---|---|
| Motorurin | 4 syl. 2.2 litur 16V 136 hk<br>HDi v/ commonrail innspræning |
| 0-100 km/t | 10,2 sek |
| Oljunýtsla | 15,6 km/l |
| Dekkstødd | 205/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd | 461,8 cm |
| Breidd | 177,0 cm |
| Hædd | 147,6 cm |
| Eginvekt | 1450 kg |
| Totalvekt | 1975 kg |
| Viðførisrúm | 456 litrar |
| Prísur | 2.2 HDi kr. 260.000,- (136 hk)<br>2.0 HDi kr. 226.000,- (110 hk) |
| Søluumboð | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur<br>FO-110 Tórshavn<br>Tlf 313666 |